# Talgildur Samleiki

## Karmar um útboð

MARS 2017

TALGILDU FØROYAR

01100110 01101111

# Innihaldsyvirlit

**1 INNGANGUR ... 3**

1.1 SKJALAYVIRLIT ... 3

**2 GRUNDARLAGIÐ UNDIR TS ... 5**

**3 ÚTBJÓÐINGARGONGD OG FREISTIR ... 7**

3.1 ALMANNAKUNNGERÐ AV ÚTBOÐSTILFARINUM ... 7

3.2 SPURNARFUNDIR ... 7

3.3 SKRIVLIGIR SPURNINGAR ... 7

3.4 INNLATINGARFREIST ... 7

3.5 VIÐGERÐ AV TILBOÐUM ... 7

3.6 TVÍRØÐUR ... 8

3.7 INNLATINGARFREIST FYRI TILLAGAÐ TILBOÐ ... 8

3.8 VIÐGERÐ AV TILLAGAÐUM TILBOÐUM ... 8

3.9 SAMSÝNING TIL TILBOÐSVEITARAR ... 8

3.10 SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR OG UNDIRSKRIVING ... 8

**4 KRØV TIL VEITARAN ... 9**

4.1 INNLIT Í FØROYSK VIÐURSKIFTI OG KJØLFESTI Í FØROYUM ... 9

4.2 SKJALFESTA, AT STARVSFÓLKINI HAVA NEYÐUGAR FØRLEIKAR ... 9

4.3 FÍGGJARLIGA STYRKI AT LOYSA UPPGÁVUNA ... 9

4.4 VERKÆTLANARROYNDIR ... 9

**5 VEGLEIÐING TIL SVARIÐ HJÁ VEITARA ... 10**

**6 EFTIRMETING AV TILBOÐUM ... 11**

# 1 INNGANGUR

Í hesum skrivi verða teir yvirskipaðu karmarnir ásettir viðvíkjandi útboðnum av Talgilda Samleikanum.

Fyrsti parturin lýsir grundarlagið fyri at verkseta Talgilda Samleikan (TS), síðani verður greitt frá sjálvari útbjóðingargongdini og krøvunum, ið verða sett til veitarar av Talgilda Samleikanum.

Tilskilast skal, at hetta útboðið fevnir um sjálvan menningarpartin av Talgilda Samleikanum, meðan rakstrarparturin verður boðin út fyri seg millum undangóðkendar veitarar.

Tað er umráðandi fyri Gjaldstovuna, sum verkætlanareigari, og fyri gongdina í verkætlanini, at tilboðsveitarin setir seg í samband við Gjaldstovuna um møgulig ivamál, so tryggjað verður, at partarnir hava eina felags fatan av innihaldinum og vavinum av sjálvari verkætlanini. Tí verður heitt á tilboðsveitaran um bæði at senda skrivligar spurningar og hava ein virknan leiklut á kunningar- og spurnarfundunum.

Umframt hetta skrivið inniheldur útboðstilfarið eitt sáttmálauppskot og viðkomandi fylgiskjøl, víst í yvirlitinum niðanfyri. Sáttmáli verður gjørdur treytaður játtan frá Løgtinginum.

## 1.1 SKJALAYVIRLIT

Samlaða útbjóðingartilfarið fevnir um skjølini, víst í yvirilitinum niðanfyri:

| Skjal | Heiti |
|---|---|
| Skjal 1 | Karmar um útboð |
| Skjal 2 | Sáttmáli |
| Fylgiskjal 0 | Hugtøk og frøðisorð |
| Fylgiskjal 1a | Høvuðstíðarætlan |
| Fylgiskjal 1b | Staktíðarætlan |
| Fylgiskjal 2a | Tørvslýsing |
| Fylgiskjal 2b | Kravlisti |
| Fylgiskjal 2bi | Vegleiðing til 2b |
| Fylgiskjal 2bii | Finansrådets kodeks for it-sikkerhed i selvbetjeningssystemer |
| Fylgiskjal 2c | Lýsing av loysn |
| Fylgiskjal 2d | Tilfeingi hjá veitara |
| Fylgiskjal 2e | Skjalfestingar |
| Fylgiskjal 2f | Tænastumál |
| Fylgiskjal 3 | Rakstrarpallur |
| Fylgiskjal 4 | Prísir og gjaldsætlan |
| Fylgiskjal 5 | Samstarvsfyriskipan |
| Fylgiskjal 6 | Tilfeingi hjá kunda |
| Fylgiskjal 7 | Nároyndir (test) |
| Fylgiskjal 8 | Triðjapartsavtalur |
| Fylgiskjal 9 | Support- og viðlíkahaldsavtala |

Viðvíkjandi málnýtslu er útboðstilfarið deilt í partar, sum eru skrivaðir ávíkavist á føroyskum, donskum og enskum máli:

- Kunnandi tilfar er á føroyskum (karmar um útboð)
- Kravilfar, sum er viðkomandi fyri útlendskar undirveitarar er á enskum (kravlýsingar)
- Juridiskt tilfar er á donskum (sáttmáli v/fylgiskjølum)

Valið at orða kravtilfar á enskum er grundað á, at tað er eyðsæð, at føroysku veitararnir vilja brúka útlendskar undirveitarar í.s.v. tilboðsveitingina og tískil við fyrimuni fáa neyðugt innlit í kravfestingarnar.

Tað verður herumframt mett sera avgerandi, at yrkishugtøk eru eintýdd og ikki kunnu misfatast í.s.v. útbjóðingarumfarið.

Valið at orða avtalutilfar á donskum er grundað á, at støði er tikið í donskum avtalufrymlum, sum fevna um KT-verkætlanir av hesi støðd og slagi. Slíkir avtalufrymlar eru ikki tøkir á føroyskum máli, men Gjaldstovan er í eini tilgongd saman við KT-felagnum við tí endamáli at fáa hetta í lag.

# 2 GRUNDARLAGIÐ UNDIR TS

Almennu Føroyar hava sett á stovn verkætlanina Talgildu Føroyar, ið hevur sum endamál at talgilda almennar tænastur í Føroyum á hesum 4 økjunum:

- KT arkitektur (Heldin)
- Grundardátuskráir
- Portalar og tænastur
- Talgildur Samleiki

Verkætlanin *Talgildur Samleiki* er sostatt ein av teimum 4 grundleggjandi tættunum í heildarætlanini um Talgildu Føroyar.

Á vári 2015 orðaði verkætlanin *Strategi for TS*, undir Talgildu Føroyum, eina ætlan, ið varð løgd fram í Norðurlandahúsinum 25. juni 2015.

Á vári 2016 varð ein fyrireikingarætlan sett í verk fyri TS. Tilfar frá fyrireikingarætlanini er tøkt á heimasíðuni talgildu.fo undir Talgildur Samleiki/Verkætlanarfyrireiking. Sum heild kann sigast, at niðurstøðurnar frá fyrireikingarætlanini framvegis eru galdandi. Tað vilja tó vera frábrigdi í mun til fyriliggjandi útbjóðingartilfar. Rátt verður sostatt til, at tilboðsveitarar nýta tilfarið frá fyrireikingarætlanini sum bakgrundsvitan og íblástur. Tað vil tó til einhvørja tíð verða útbjóðingartilfarið, sum veitarar skulu taka støði í.s.v. tilboðsveitingina.

Grundað á verkætlanina og fyrireikingarætlanina hava Landsstýrið og føroysku peningastovnarnir gjørt eina sponsoravtalu um at seta í verk ein felags TS fyri Føroyar.

Yvirskipaða málið við at seta í verk talgildan samleika í Føroyum er at fáa til vega eina tøkniliga loysn, sum kann virka sum

### *Eitt ómakaleyst samleikaprógv*

Borgarar og vinna fara í alsamt størri mun at samskifta og avgreiða síni viðurskifti við tað almenna talgilt umvegis talgildar tænastur, og tí fáa øll sín egna talgilda samleika – eitt talgilt samleikaprógv og ein talgilda undirskrift.

Talgildi Samleikin skal vera eitt tilboð til allar borgarar í Føroyum, harímillum tey ið bera brek ella á annan hátt hava serligar avbjóðingar, og eingin ætlan er um, at tvinga brúkarar at nýta loysnina. Harumframt skulu allir persónsupplýsingar verða viðgjørdir við virðing fyri tí persónliga frælsinum í samsvari við løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

Í Føroyum er lóggáva um elektroniska undirskrift (løgtingslóg nr. 74 frá 25. mai 2009), sum skal fremja trygga og virkna nýtslu av elektroniskum samskifti. Føroyska lógin vísur til fyriskipan 1999/93 EF, sum er farin úr gildi, og tí skal lóg um elektroniska undirskrift endurskoðast. Tó eru krøvini í lógini framvegis galdandi og aktuell fyri Talgilda Samleikan.

ES-fyriskipan um elektroniska eyðmerking og álitistænastur (EU-forordning nr. 910/2014 af 23. juli 2014 – hereftir eIDAS), regulerar í dag hetta umráðið í ES. eIDAS fevnir um eitt størri lógarøki enn føroyska lógin um elektroniska undirskrift ger, men er ikki í andsøgn við hesa, men stillar tó í nøkrum førum eyka krøv, útyvir tey ið finnast í føroysku lógini um elektroniska undirskrift.

Avgjørt er, at Talgildi Samleikin skal mennast í samsvari við krøv í eIDAS. Hetta skal tryggja, at Talgildi Samleikin í framtíðini eisini kann viðurkennast sum samleikaprógv og bindandi undirskrift í øðrum londum. Gongd verður tí sett á, samstundis sum við menningini av loysnini, at innarbeiða eIDAS í føroyska lóggávu, annaðhvørt við nýggjari lóg ella við at endurskoða verandi lóggávu.

Talgildi Samleikin skal verða eitt KT undirstøðukervi sum ger tað møguligt at:

1) vátta samleikan hjá einum persóni talgilt, t.d. tá ein persónur innritar á eina heimasíðu (eyðmerking/autentifikatión) og
2) undirskriva løgfrøðiliga bindandi skjøl talgilt (signatur)

Ad.1 ) Tá ein persónur gevur seg til kennar (identifikatión) á einari talgildari tænastu, er týdningarmikið, at tænastan er vís í, at persónurin veruliga er tann, viðkomandi sigur seg vera. TS skal veita persóninum ein talgildan samleika og trygg eyðmerkingaramboð til hetta, so persónurin kann vátta (autentifikatión) sín samleika mótvegis hesum tænastum.

eIDAS - saman við tilhoyrandi fyriskipanum (serligar 'gennemførelsesførelsesforordninger') - setur krøv til mannagongdir rundanum talgilda eyðmerking, m.a. til skráseting og innliman í loysnina, útvegan av eyðmerkingaramboðum og eftirlit. Hetta fyri at tryggja, at vissa er fyri, at tann persónurin, ið brúkar loysnina, í veruleikanum er sami likamligi persónurin, ið hevur fingið TS útflýggjaðan.

Ad. 2) eIDAS fevnir eisini um reglur um talgilda undirskrift. Sambært eIDAS skal ein skikkað (kvalifiserað) talgild undirskrift, rættarliga javnmetast við eina hondskrivaða undirskrift í ES. Fyri at ein talgild undirskrift skal roknast sum viðurkend, skulu krøv í eIDAS til sjálva loysnina umframt mannagongdir rundan um loysnina, lúkast.

# 3 ÚTBJÓÐINGARGONGD OG FREISTIR

Niðanfyristandandi tíðarlinja vísir útbjóðingargongdina, ið verður nágreiniligari lýst undir myndini:




## 3.1 ALMANNAKUNNGERÐ AV ÚTBOÐSTILFARINUM

Útboðið varð almannakunngjørt týsdagin 28. mars 2017 á Keypsportalinum. Teir veitarar, sum hava ynskja at bjóða upp á hesa loysn, kunnu venda sær til Rolf Herup Olsen, verkætlanarleiðara, á rolf@talgildu.fo fyri at fáa hesi skjøl útflýggjaði.

## 3.2 SPURNARFUNDIR

Í útbjóðingarumfarinum verða hildnir í alt 3 spurnarfundir hesar tíðir:

| | |
|---|---|
| **Spurnafundur 1** | Fundurin verður **hósdagin 6. apríl** 2017 kl. 13.00 - 15.00 á Gjaldstovuni |
| **Spurnafundur 2** | Fundurin verður **mánadagin 24. apríl** 2017 kl. 13.00 - 15.00 á Gjaldstovuni |
| **Spurnafundur 3** | Fundurin verður **mánadagin 15. mai** 2017 kl. 13.00 - 15.00 á Gjaldstovuni |

## 3.3 SKRIVLIGIR SPURNINGAR

Til ber hjá veitarunum at seta Gjaldstovuni skrivligar spurningar um loysnina og settu krøvini. Settir spurningar verða gjørdir navnleysir og svaraðir so hvørt. Spurningar og svar verða almannakunngjørd so hvørt á heimasíðuni hjá Talgildu Føroyum, www.talgildu.fo .

## 3.4 INNLATINGARFREIST

Veitarar skulu, innan innlatingarfreistina **23. mai 2017 kl. 12.00** lata møgulig tilboð inn í móttøkuni á Gjaldstovuni, Kvíggjartún 1 á Argjum. Tilboð skulu latast inn útskrivað í tveimum eintøkum og talgilt sum pdf á einum geyma.

## 3.5 VIÐGERÐ AV TILBOÐUM

Innkomin tilboð verða viðgjørd fram til fríggjadagin **5. juni 2017**. Í tíðarskeiðnum **6 - 9. juni** verður bjóðað til tvírøður (dialogmøder) við veitararnar, sum hava latið inn góðkend tilboð.

Um talan er um fleiri enn fýra innkomin tilboð, tilskilar Gjaldstovan sær rætt til at bjóða í mesta lagi fýra veitarum víðari til tvírøðuumfar. Valdir verða teir veitarar, ið best liva upp til treytirnar smb. "kapitul 4 – Krøv til veitaran", umframt hava latið inn dygdargott tilboð, sum inniheldur nøktandi svar upp á alt, sum verður kravt smb. hesum útboði. Bert hesir veitara fáa høvi at lata inn tillagað tilboð, sí punkt 3.7 niðanfyri.

## 3.6 Tvírøður

Ein tvírøðufundur verða hildin við hvønn einstakan tilboðsveitara við tí endamáli at tryggja, at veitari og kundi hava eina felags fatan av tilboðnum og loysnini.

Tvírøðufundirnir fylgja hesi vegleiðandi skrá:

1. Framløga av veitara um teirra loysn/tilboð
2. Spurningar
3. Ítøkiligar ávísingar til møguligar tillagingar av tilboðnum

Avsettir eru 3 tímar til hvønn tvírøðufund. Undan tvírøðufundunum kann Gjaldstovan senda veitaranum yvirlit yvir evnir, sum ynskjast viðgjørt nærri.

## 3.7 Innlatingarfreist fyri tillagað tilboð

Veitarar skulu, innan innlatingarfreistina **20. juni 2017 kl. 12.00**, lata tillagað tilboð inn í móttøkuni á Gjaldstovuni, Kvíggjartún 1 á Argjum. Tillagað tilboð skulu latast inn útskrivað í tveimum eintøkum og talgilt sum pdf á einum geyma.

## 3.8 Viðgerð av tillagaðum tilboðum

Innkomin tillagað tilboð verða viðgjørd fram til týsdagin **27. juni 2017**, tá veitarin, ið mettur verður at hava bestu fortreytir at loysa uppgávuna útfrá ásettu krøvunum, verður bjóðaður til sáttmálasamráðingar.

## 3.9 Samsýning til skikkaðar tilboðsveitarar

Tilboðsveitarar, ið lata inn dygdargott tilboð, smb. 3.5 omanfyri - og hava gjørt nøktandi tillagingar av tilboðunum við støði í tvírøðufundnuum - men tó *ikki* verða valdir til at loysa uppgávuna at menna Talgilda Samleikan, samsýnast við **kr. 70.000 u/mvg**.

## 3.10 Sáttmálasamráðingar og -undirskriving

Sáttmálasamráðingarnar millum útvalda veitaran og Gjaldstovuna verða í døgunum mikudagin, hósdagin og fríggjadagin **28. til 30. juni 2017**.

Verkætlanin verður sett í verk, beint aftaná at sáttmálin er undirskrivaður, í samsvar við avtalaðu parttíðar-ætlanina. Formligi byrjunardagurin fyri verkætlanina er ásettur til **14. august 2017**.

# 4 Krøv til veitaran

Av tí at stovnsetanin av TS setur herd krøv til vitan um og innlit í eitt nú lóggávu, KT trygd, kryptering og PKI tøkni, verða sett nøkur yvirskipað krøv til førleikarnar hjá tilboðsveitara, umframt fíggjarliga styrki.

Veitarin verður tí biðin um, í fylgiskjali 2d, at lýsa fyritøkuna á fylgjandi økjum:

## 4.1 Innlit í føroysk viðurskifti og kjølfesti í Føroyum

Fyri at lúka krøvini, skal talan vera um fyritøku, sum er skrásett í Føroyum og í størstan mun skal:

- reka sítt virksemi í Føroyum
- hava starvsfólk, sum arbeiða í Føroyum

Veitarin kann nýta aðrar – eisini útlendskar – samstarvsfelagar, sum hjálpa honum við serligum uppgávum. Tað er tó av týdningi, at neyðug vitan og førleikar hjá útlendskum veitarum verða kjølfestir í Føroyum.

Høvuðsmálið í samskiftinum millum veitara og Gjaldstovuna skal vera føroyskt, og tískil er minstakrav, at tey starvsfólk hjá veitarunum, sum samskifta við Gjaldstovuna, skilja føroyskt.

## 4.2 Skjalfesta, at starvsfólkini hava neyðugar førleikar

Veitarin skal lýsa, hvørji starvsfólk verða atknýtt verkætlanini, umframt hvørjir førleikar hesi hava við atliti til krøv til loysn.

## 4.3 Fíggjarliga styrki at loysa uppgávuna

At standa fyri menning av TS krevur, at veitarin, umframt fakliga, eisini er fíggjarliga førur fyri at fremja verkætlanina, m.a. at ogna sær neyðugu samanseting av vitan og starvsfólkum við skikkaðum førleikum í avtalutíðarskeiðnum.

Fyri at prógva, at veitarin hevur neyðugu fíggjarorkuna, skal hann vísa nýggjastu roknskapartøl og útlit fyri næstu 3-4 árini, sum sáttmálin fevnir um. Veitarin skal í stuttum lýsa, hvørjar ætlanir hann hevur, sum kunnu ávirka samstarvið við Gjaldstovuna.

## 4.4 Verkætlanarroyndir

Veitarin verður biðin um at gera eina lýsing av verkætlanarfrymlinum, ætlanin er at taka støði í, og greiða frá hvørjar royndir og førleikar veitarin hevur við hesum arbeiðsháttinum frá øðrum, líknandi verkætlanum.

Av tí at stovnsetanin av TS fer at krevja tætt samstarv við kundan, ynskir Gjaldstovan, at viðkomandi partar av verkætlanini verða framdir eftir einum Agile verkætlanarfrymli. Hesir partar skulu avtalast nærri.

# 5 VEGLEIÐING TIL SVARIÐ HJÁ VEITARA

Veitarin hevur ábyrgdina av at írokna allar útreiðslur og veitingar, sum er neyðugar fyri at kunna lata alt, sum biðið verður um.

Útboðstilfarið inniheldur eitt ***sáttmálauppskot*** og ***viðkomandi fylgiskjøl***.

Øll fylgiskjøl skulu verða útfylt sambært vegleiðingini, sum er lýst í hvørjum fylgiskjali sær.

Veitarin skal svara øllum fylgiskjølum, ið krevja svar, fyri at tilboðið kann gerast galdandi. Tað er ikki møguligt at taka fyrivarni ella gera broytingar í sáttmálauppskotinum í sambandi við at tilboð verður latið.

Niðanfyristandandi yvirlit vísir hvørji fylgiskjøl krevja svar frá veitara:

| Fylgiskjal | Heiti | Veitarin fyllir út |
|---|---|---|
| **0** | Hugtøk og frøðisorð | |
| **1a** | Høvuðstíðarætlan | |
| **1b** | Staktíðarætlan | √ |
| **2a** | Tørvslýsing | |
| **2b** | Kravlisti | √ |
| **2bi** | Vegleiðing til 2b | |
| **2c** | Lýsing av loysn | √ |
| **2d** | Tilfeingi hjá veitara | √ |
| **2e** | Skjalfestingar | √ |
| **2f** | Tænastumál | √ |
| **3** | Rakstrarpallur | √ |
| **4** | Prísir og gjaldsætlan | √ |
| **5** | Samstarvsfyriskipan | √ |
| **6** | Tilfeingi hjá kunda | √ |
| **7** | Nároyndir (test) | √ |
| **8** | Triðjapartsavtalur | √ |
| **9** | Support- og viðlíkahaldsavtala | √ |

Eru svarini frá veitara ikki nøktandi, tilskilar Gjaldstovan sær rætt til at seta veitaranum fleiri spurningar fyri at fáa svarini útgreinað.

# 6 EFTIRMETING AV TILBOÐUM

Bert tilboð, ið er verða latin inn rættstundis, verða viðgjørd.

Gjaldstovan tekur bert tilboð til viðgerðar, sum ganga krøvunum í hesum skjalinum á møti, umframt vegleiðingar til fylgiskjøl til veitaran.

Gjaldstovan metir manglandi svar uppá eitt krav, sum at hetta kravið ikki er lokið.

Yvirskipaða vektingin av tilboðunum er Prísur: 50%, Góðska: 50%.

Í yvirlitinum niðanfyri er útgreinað, hvussu einstøku lutirnir vera vektaðir og hvørji krøv hava serligan týdning í sambandi við meting av tilboðnum.

Próvtøl verða givin frá 0-10 har 0 er lægst og 10 er hægst (tað besta).

Gjaldstovan tilskilar sær rætt til at vísa øllum tilboðum aftur.

| **Krøv** | **Metingargrundarlag** | **Vekt** |
|---|---|---|
| Prísur - Loysn | Prísurin fyri loysnina verður mettur út frá samlaða prísinum, íroknað Software Assurance og Support og Viðlíkahald fyri 5 ár, smb. útgreining í fylgiskjali 4 | 46% |
| Prísur - Ráðgevaragjøld | Prísurin fyri møgulig serstøk ráðgevaragjøld, sum eisini skal tilskilast í fylgiskjali 4, verður roknaður sum ein miðal tímatakstur grundaður á takstirnar i fylgiskjal 4 og verður umroknaður til ráðgevarastig eftir hesum útrokningarháttinum:<br><br>Ráðgevarastig fyri tilboð = (lægsti tímatakstur/tímatakstur á tilboði) x 10 | 2% |
| Prísur – Optión Heimildarloysn | Bert optiónin viðvíkjandi Heimildarloysn/Mandate Solution verður vektað smb. prísi í fylgiskjali 4.<br><br>Stig fyri tilboð = (lægsti prísur/tilboðsprísur) x 10 | 2% |

| Krøv | Metingargrundarlag | Vekt |
|---|---|---|
| Góðska - loysn | Tilboðini verða mett í mun til í hvønn mun tey uppfylla nevndu krøvini í *fylgiskjali 2b*. Hetta verður gjørt við at rokna út kravstig fyri hvørt einstakt krav.<br><br>Kravstig (Point) = Týdningur av kravinum (Vigtighed) * Góðskumetingin (Score)<br><br>Týdningurin av krøvunum er grundaður á meting hjá Gjaldstovuni av hvørjum einstøkum kravi á einum stiga frá 1-10, har 10 er mest týðandi.<br><br>Góðskumetingin byggir á ein stiga frá 0-3, har 0 merkir *ikki lokið*, 1 merkir *bert lutvíst lokið*, 2 merkir *lokið* og 3 er *væl lokið*.<br><br>Kravstigini verða tald saman og ein lutfalslig útrokning verður gjørd smb. hesum frymli:<br><br>Kravstig fyri tilboð = (Stig í alt fyri tilboð / flest stig í alt) x 10<br><br>Harumframt verður ein serlig góðskumeting gjørd av niðanfyristandandi kriterium, ið hava týdning fyri Gjaldstovuna:<br><br>1. Kravstig – 12%<br>2. Trygd - 4%<br>3. Mobil & eindir – 8%<br>4. Arkitekturur – 6%<br>5. Nýtsluvinarlig – 6%<br>6. Mannagongdir – 4%<br>7. Optiónir – 2%<br>8. Heildarmeting av tilboði – 2%<br><br>Omanfyristandandi krøv verða góðskumett og próvtøl ásett frá 0 til 10 fyri hvørt einstakt punkt.<br><br>Hesi 8 góðskukrøvini verða tikin við í samlaðu útrokningarnar við tí prosent-talinum, ið krøvini eru ásett at viga. | 44% |
| Góðska - verkætlan | Ein góðskumeting av niðanfyristandandi viðurskiftum, ið hava týdning fyri hvussu veitarin skipar og íverksetur verkætlanina, verður framd:<br><br>1. Verkætlan - mett verður m.a. út frá tilfeingi hjá veitara umframt verkætlanarbygnaði (fylgiskjal 2d og 5) og góðskan í tíðarætlanini (fylgiskjal 1b) – íalt 6%<br><br>Omanfyristandandi verður góðskumett og próvtal ásett frá 0 til 10.<br><br>Góðskukravið verða tikið við í samlaðu útrokningarnar við tí prosenttalinum, ið kravið eru ásett at viga. | 6% |

## 6.1 ÚTGREINING AV METING: GÓÐSKA – LOYSN

### Kravstig -12 %
Ein meting av krøvum í 2b smb. vegleiðing í skemanum omanfyri.

### Trygd – 4%
Ein heildarmeting av hvussu veitarin svarar krøvunum viðvíkjandi trygd í varðunum "Non-functional Requirements", og "Functional Requirements, serliga við atliti til *Fundamentals – Authentication* og *Fundamentals – Signature*.

### Mobil & eindir – 8%
Ein heildarmeting av nýtsluvinarligheit og trygd av teimum eindum, sum brúkara skulu nýta til autentifisering og signatur. Herumfarmt hvussu væl veitarin livir upp til arkitekturprinsippið "Mobile-First".

### Arkitekturur – 6%
Ein heildarmeting av hvussu loysnin er samansett, hvørjar eindir vera brúktar, hvussu opin tøknin er, soleiðis at Gjaldstovan í minst møguligan mun er bundin at ávísum undirveitarum og produktum, bæði sum borgarar skulu nýta, og back-end servara parturin av trygdarkjarnini av loysnini. Eisini verður 2c, brot 2.2 og 2.3 sum heild mett við arkitekturprinsippunum í huga.

### Nýtsluvinarlig – 6%
Ein heildarmeting av hvussu nýtsluvinarlig samlaða loysnin er. Usability krøv í *Functional Requirements* í 2b, saman við einari meting av tí sum veitarin lýsir í 2c, brot 2.1, av skermskitsum/Wire Frames av ymsu Web applikatiónunum, og evt. app myndum.

### Mannagongdir – 4%
Ein heildarmeting av svarunum, sum viðvíkja Administration *Krav*-krøv í *Functional Requirements*, saman við tí sum Veitarin skrivar í 2c, brot 2.1 um hvussu ymsar lykla-mannagongdir vera framdar.

### Optiónir – 2%
Ein heildarmeting av góðskuni í svarinum viðvíkjandi optiónum.

### Heildarmeting av tilboði – 2%
Ein heildarmeting av samlaðu góðskuni av tilboðnum hjá veitaranum.